# Stuðul til gransking



Gransking í Føroyum, stuðulsmøguleikar, krøv, mannagongdir, hagtøl

Føroyahúsið 6. mars 2017

granskingarráðið
RESEARCH COUNCIL FAROE ISLANDS

granskingarráðið RESEARCH COUNCIL FAROE ISLANDS




# Gransking í Føroyum




## Almennir granskingarstovnar

- Fróðskaparsetur Føroya – University of the Faroe Islands
- Havstovan – Faroe Marine Research Institute
- Jarðfeingi – Earth and Energy Directorate
- Tjóðsavn Føroya – Faroe Islands National Heritage
- Deildin fyri Arbeiðs og Almanaheilsu – Dept. of Occupational and Public Health
- Landssjúkrahúsið – National Hospital
- Ílegusavnið – Genetic Biobank
- Umhvørvisstovan – The Environment Agency
- Heilsufrøðiliga Starvsstovan – Faroese Food and Veterinary Agency
- Búnaðarstovan – Agricultural R&D





## Almenn partafeløg við gransking

- Fiskaaling – Aquaculture Research Station
- iNOVA Granskrasetur - Research Facilities plant (Biosciences, DNA).



## Stuðulsskipanir til gransking, menning og nýskapan

- Granskingargrunnurin – Research Fund – 7,5 mil. DKK. (2017)
- Fiskivinnuroyndir – Fisheries R & D – 8,5 mil. DKK. (2017)
- Vinnuframi – Industrial Innovation Fund – 3,2 mil. DKK. (2017)







# Stuðul úr Granskingargrunninum

- Stuðul kann latast til øll granskingarøki og til ymisk sløg av verkætlanum

- Yvirskipað krøv eru ásett við løgtingslóg, granskingar-nevndin ásetir neyvari formlig krøv í lýsingini

- Høvuðskrav
  - Fyri at fáa studning úr granskingargrunninum krevst, at granskingin verður
    1) framd av føroyskum granskarum ella
    2) framd í samstarvi við føroyskar granskingarstovnar ella
    3) mett at hava samfelagsligan týdning fyri Føroyar

- Ein umsóknarfreist um árið, tøk játtan í 2017 er 7,5 mill. kr. 42 umsóknir komu inn, vanliga fáa 8-12 stuðul.

# Aðrar stuðulsskipanir

- Sjúkrakassagrunnurin
  - Høvuðsøki 1 – til áhugafeløg til átøk og kanningarverkætlanir, sum skulu menna heilsuøkið
  - Høvuðsøki 2 – til granskingarverkætlanir á heilsuøkinum
  - Høvuðsøki 3 – til heilsugranskingarsamstarv
- Stuðul til vinnugansking - ávegis
- Stuðul til vísindaligar útgávur – Open Access
- Stuðul til at skriva Horizon 2020 umsóknir



# Stuðulsøki og -sløg

- Granskingarráðið orðaði í 2003 seks høvuðsøki, sum kundu stuðlast
  - Matur, Mentan, Samfelag, Náttúra og Náttúrutilfeingi, Heilsa og Tøkni
- Stuðul verður játtaður til ymisk sløg av verkætlanum: ph.d., post.doc., styttri verkætlanir, vinnuverkætlanir, infrakervi.
- Stovnar ella virki søkja saman við verkætlanarleiðara
- Oyðublað við vegleiðing og krøvum á gransking.fo



# Krøv til verkætlanir

- Verkætlanarlýsing í mesta lagi 10 s. kravd – sí neyv krøv
- Dentur verður lagdur á væntaðu nyttuna, varðar og veitingar
- Um ph.d. verður kravt frá høvuðsvegleiðara: Fomlig játtan um at vegleiða, váttan av granskingarførleika hjá umsøkjaranum og CV
- Føroyskt lønarlag og útreiðslustig, skal vera útgreinað. Viðfígging skal skjalprógvast. Kann vera inkind og/ella stuðul
- Eginfígging 1/3, um vinnuverkætlan 1/2. Er rakstrargjald omanfyri 20%, er best, at eginfíggingin er meira enn 1/3
- NÝTT: Ætlan fyri miðling av granskingini, open acces í størst møguligan mun
- NÝTT: Frágreiðing um etisk viðurskifti
- NÝTT: Ætlan fyri handfaring av dátum, open acces í størst møguligan mun



# Verkætlanarlýsing í mesta lagi 10 s.

- Hvønn almennan týdning umsøkjarin metir verkætlanina hava
- Hvønn fakligan týdning umsøkjarin metir verkætlanina hava
- Væntað úrslit av verkætlanini, íroknað varðar og veitingar
- Arbeiðsháttur og ástøði
- Upplýsing um møguligir etiskar spurningar. Kravd loyvi ella ætlan um umsókn í hesum sambandi skulu leggjast við.
- Upplýsingar um granskingina ella menningina higartil á økinum við viðkomandi tilvísingum
- Upplýsingar um tilfar, t.e. keldutilfar, spurnabløð v.m.
- Knýti til aðrar verkætlanir
- Ætlan um almannakunngerð og gagnnýtslu av verkætlanarúrslitum, open access í størst møguligan mun
- Ætlan um handfaring, goymslu og atkomu til innsavnaðar granskingar-dátur frá verkætlanini, open access atkoma í størst møguligan mun
- Altjóða samstarv og sambond



# Viðgerð av umsóknum



- Umsøkjarar fáa vegleiðing fram til fáar dagar fyri freistina, fokus á formkrøv, vegleiða ikki um tað fakliga.
- Ov seinar umsóknir verða avvístar.
- Skrivstovan metir um, hvørt umsóknirnar lúka formkrøvini. Ófullfíggjaðar umsóknir kunnu verða avvístar.
- Allar góðkendar umsóknir verða sendar til uttanhýsis metingar, um tær ikki eru mettar áður. Skrivstovan finnur metingarfólk




- Granskingarnevndin viðger umsóknirnar og tekur avgerð í mai.
  - Dentur á vísindaligu góðskuna á verkætlanini, førleikarnar hjá umsøkjaranum og aktuella granskingarumhvørvinum, sannlíkindini fyri at kunna fullføra verkætlanina innan ásettu tíðar- og fíggjarkarmarnar. Harafturat á samfelagsliga týdningin í breiðari merking, herundir førleikamenning og vinnuligar vakstrarmøguleikar.
- Svar við avriti av metingunum síðst í mai.

# Hagtøl

- Næstan 200 verkætlanir stuðlaðar úr Granskingargrunninum
- Gott 60 í gongd nú, í Føroyum og uttanlands, 1-4 ár til longdar
- Nakrar fáar steðgaðar fyri tíð ella fóru ikki í gongd, annars ganga tær flestu væl, tó ofta drúgvari enn mett.
- Flestu á økjunum mentan, heilsa, náttúra og náttúrutilfeingi, vaksandi tal á samfelagsøkinum
- Meira enn helvtin er ph.d.verkætlanir
- Allar verkætlanir síggjast í Stuðulsyvirlitinum á gransking.fo

granskingarráðið RESEARCH COUNCIL FAROE ISLANDS

# Góð ráð




- Byrja í góðari tíð!
- Spyr, um tað eru serlig viðurskifti, tú eigur at hugsa um í sambandi við tína verkætlan
- Kanna aðrar fíggingarmøguleikar samstundis eisini. Góð eginfígging hevur sera stóran týdning.
- Tak upp samband við onnur, sum arbeiða innan sama øki, ger avtalur um samstarv
- Fá onkran við royndum at lesa umsóknina við denti á arbeiðs-, tíðar- og fíggjarætlanina
- Góð mið: gransking.fo, serliga Heilagrunnurin og Stuðulsyvirlitið, tíðindabræv okkara

granskingarráðið

RESEARCH COUNCIL FAROE ISLANDS